# Gull-slúkurin

**Stóri vinnarin í fimleikakappingini hjá monnum, var beinbrotin fyri bert trimum mánaðum síðani**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*

Lagið var sum kunnugt gott á Helga Winther Olsen, eftir at hann mikudagin hevði tikið sær av so at siga øllum tí, sum hann hevði møguleika at taka. Meðan bíðað varð eftir úrslitunum fyri íðkanina í dupultu barrini, fingu vit orðið á Helga, sum bara gekk runt og líktist einum stórum smíli.

- Enn havi eg ikki fingið tað seinasta at vita, so kanska verður okkurt. Kanska heiðursmerki, men neyvan gull. (Nakað seinni varð tó staðfest), at talan aftur hesa ferð gjørdist um gull.

- Tað er bara heilt perfekt. Kundi ikki verið betri. Alt hetta við uppafturvenjingini og soleiðis gjørdi jú sítt til, at tað var sera ivasamt, um eg yvirhøvur var førur at luttaka í kappingini. At tað so fór at ganga so væl, hevði eg als ikki droymt um.

- Eg breyt beinið 26. mars, so talan hevur verið um sera nógva venjing fyri at kunna taka lut her á Oyggjaleikunum.

- Kanska hevur talan verið um ov nógva venjing, so soleiðis at alt hevur gingið eitt sindur ov skjótt. Eftir hetta fari eg so bara at slappa av í ein mánað, tí eri bangin fyri, at beinið snøgt sagt kann støkka av aftur, um tað ikki fær neyðugu hvíldina.

## Ov spentur

At enda spurdu vit Helga, hvat mól runt í heysinum á honum, tá hann trein inn í fimleikahøllina mikumorgunin.

- Eg var spentur. Eg haldi ongantíð eg havi verið somikið spentur fyrr, og allar helst var tað í meira lagi.

- Eg megnaði tó at brúka hetta positivt, soleiðis at adrenalinið fór at pumpa í kroppinum, og samanumtikið, so gekk hetta bara heilt væl.









# Lagið var betri

**Kontrastirnir vóru stórir í mun til samrøðuna mánadagin, tá vit um døgurðatíð mikudagin hittu landsliðsvenjaran hjá Føroyum, Henrik Berthelsen**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle of Man*




*- Vit bóðu leikararnir leggja mánadagin aftur um bak, og tað hava teir so eisini gjørt, segði ein ovurfegin, Henrik Berthelsen*

Øll úrslitini vóru ikki kunngjørd, men tá vit hittu landsliðsvenjaran á orði, høvdu føroysku íðkararnir longu tryggjað sær sjey av níggju møguligum heiðursmerkjum.

Spurdur, um lagið nú var betri, enn tað var mánadagin, brosaði Henrik og segði, at sjálvandi var tað tað.

- Tað er heilt klárt, at tað nú eru veruligu karakterirnir, sum verða givnir. Hetta ger, at vinnararnir verða teir røttu, og tíbetur er líkt til, at tað eru vit, sum fara avstað við tí mesta, og enn eru tvær kappingar eftir, so hvør veit.

## Bóðu teir gloyma

Sæð í ljósinum av kappingini mánadagin, so kundi ein borið ótta fyri, at føroysku íðkararnir kanska fóru at verða uppsettir mikudagin, men soleiðis varð tíbetur ikki. Spurdur, hvat hann hevði sagt sínum íðkarum í tíðarbilinum frá mánakvøldinum til mikumorgunin, segði Henrik, at hann fyrst og fremst hevði biðið teir um at gloymt alt tað, sum hendi mánadagin.

- Eg royndi bara at fáa teir at leggja alt hatta aftur um bak. Segði við teir, at tað sum hendi frameftir í málinum, skuldu vit nokk taka okkum av, og tað hava vit so eisini gjørt.

- Teir fingu boð um at fokusera upp á dagin í dag, og tað hava teir gjørt, og higar til hevur tað jú gingið framúrskarandi, segði venjarin at enda.

# Uppsettir

**Einki er at siga til, at føroysku fimleikararnir vóru eitt sindur eyka uppsettir mikudagin**

FIMLEIKUR
*Jákup Mørk/Álvur Haraldsen – Isle og Man*



*- Vit vístu teimum, hvat skápið skuldi standa*

Eftir íðkanina hittu vit Høgna Øster, og fyrsti spurningnurin var sjálvandi, um føroysku fimleikararnir ikki vóru eyka uppsettir í dag, orsakað av hendingini mánadagin.

- Man ikki tað. Sjálvandi vóru vit tað. Øll vistu jú av, at hatta í liðkappingini var snýt, og tað ringasta er eisini, at teir av Man sjálvir hava viðgingið, at so var. Teir søgdu við ein hjá okkum og við venjaran hjá Jersey, at einasti mátin, sum teir kundu vinna uppá, var við at gera so sum teir gjørdu.

- Í dag høvdu vit so møguleikan at vísa teimum, hvar skápið skuldi standa. Vit skuldu vinna, og vísa teimum, at hatta, sum hendi mánadagin var heilt við síðuna av, og tað haldi eg so avgjørt eisini, at vit megnaðu, segði ein fegin Høgni Øster at enda.










